

*Tóta hevði eisini orðið á fundinum. Undir liðini á henni situr Kári Sverrison*



*Eini 200-300 fólk vóru á borgarafundi í Glyvra skúla hóskvøldið, har tey viðgjørdu ungdómsmál í Runavíkar kommunu. Ein stórur partur av fundinum snúði seg um, at ein meiriluti í býráðnum hevur sítt fyri at geva Kenneth Rasmussen dansi-og skeinkiloyvi. Málið um bowlinghøllina, sum ætlandi skuldi verða á Rytuvíkarhálsi, var eisini havt á lofti*

# Hópur av fólki umrøddu dansi- og skeinkiloyvi

**– Tað, sum eg haldi er ógvuliga óheppið, er, at dansi-og skeinkiloyvið verður sett upp ímóti kristindóminum. Kristindómurin hevur sínar aktivitetir og fær frið at hava sítt virksemi. Dansur og skeinking er eitt heilt annað mál, og hesi viðurskifti eiga ikki at verða sett upp ímóti hvørjum øðrum, sigur Laura Olsen, sum var ein av stigtakarunum til borgarafundin**

BORGARAFUNDUR
*Orð: Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*
*Myndir: Maria Olsen*

Fimleikarhøllin í Glyvra skúla var nærum fullsett á borgarafundinum hóskvøldið, sum ein bólkur av foreldrum at umgdómi og onnur tóku stig til.

Laura Olsen, sum var ein av stigtakarunum, sigur, at eini 200-300 fólk vóru á fundi hetta kvøldið.

Hon sigur, at hetta var ein góður og siðiligur fundur, sum í fyrsta lagi snúði seg um at fáa at vita, hví Runavíkar býráð feldi eina umsókn um dansi-og skeinkiloyvi í kommununi. Somuleiðis var málið at finna út av, hví kommunan ikki vil loyva, at smiðjubygningurin hjá Frithleifi Olsen á Rytuvíkarhálsi verður keyptur til bowlinghøll, tí bygningurin liggur á einum ídnaðarøki.

– Vit skipaðu fyri fundinum fyri at fáa greiði á, hvat veruliga liggur til grunds fyri teimum avgerðum, býráðið hevur tikið.

## Pínlig byrjan

Laura heldur, at byrjanin av fundinum var eitt sindur pínlig, sum hon tekur til, tí tað var býráðsformaðurin, Rodmundur Nielsen, sum einsamallur tosaði og svaraði spurningum vegna býráðið.

– Í býráðnum var Rodmundur fyri at geva Kenneth Rasmussen dansi-og skeinkiloyvi, men hann hevði eisini til uppgávu á borgarafundinum at tosa fyri tey í býráðnum, sum ikki tóku undir við hesum.

Hon sigur, at so hvørt, sum fundurin leið, og spurningar vórðu settir beinleiðis til ávísu býráðslimirnar, fingust hesir at grundgeva fyri, hví teir høvdu atkvøtt, sum teir høvdu.

– Tað, sum eg haldi er so óheppið, er, at dansi-og skeinkiloyvið verður sett upp ímóti kristindóminum. Hetta haldi eg vera ótrúliga keðiligt. Kristindómurin hevur sínar aktivitetir og fær frið at hava sítt virksemi. Dansur og skeinking er eitt heilt annað mál, og hesi viðurskifti eiga ikki at verða sett upp ímóti hvørjum øðrum.

Laura vísir á, at tað eru fleiri ungdómar, sum bæði ganga á møti og ganga í dans, og tí er eingin meining í at seta hesi tingini upp ímóti hvørjum øðrum.

– Vit eiga at trúgva uppá og hava álit á, at ungdómurin dugir sær hógv. Krøvini til skeinking eru so strong, og karmarnir eru so væl skipaðir, at als ikki er neyðugt, at dansur og skeinking føra til ólevna.

Hon vísir á, at deyðadrukkin fólk sleppa ikki inn at drekka, har skeinking er. Skikka tey sær ikki væl millum onnur, sleppa tey heldur ikki at vera verandi. Tú noyðist at uppføra teg sámuliga, skalt tú njóta eitt tilboð, har dansur og skeinking fer fram.



*Onkur, ið hevði sett bilin á skeivt stað í tí "skeivu" løtuni, var óheppin, tí P-vørðurin hevði verið fram við, meðan fundurin var í Glyvra skúla*

## Við skeivum eygum

– Eg haldi, vit síggja hetta við skeivum eygum. Hvussu var ikki, tá ið parabolirnir komu? Tá var alt á gosi, tí nú fór ungdómurin bara at sita við hús og hyggja at pornufimlum. Í dag er parabolur næstan á hvørjum horni. Tú hyggur at tí, tú ætlar tær – og hevur tú hug at fara í dans eitt kvøld, so fert tú tað. Hetta snýr seg um, at hvør einstakur eigur at duga sær hógv, sigur Laura Olsen, sum vísir á, at tað var Kári Thorsteinsson, sum leiddi fundin í Glyvra skúla við hepnari hond.

At enda sigur hon, at tey, sum eru fyri, at býráðið gevur dansi-og skeinkiloyvi, sjálvsagt virða, at onnur hava eina aðra meining.

– Tað er ein erlig søk at halda, at dansi-og skeinkiloyvi ikki eiga at tvinnast saman, men tað er hugstoytt, tá ið kristindómur og hesi viðurskifti verða sett upp ímóti hvørjum øðrum. Tað tænir í hvussu er ongum endamáli, sigur Laura Olsen at enda.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!



# Gagnnýtsla av fiski í Pakkhúsinum



*Í dag er evnisdagur í Stóra Pakkhúsi um gagnnýtslu av fiski*

*Mynd: D. Holm*

**Suðuroyar Skeiðsdepil skipar fyri áhugaverdum evnisdegi í Stóra Pakkhúsi í Vági í dag**

EVNISDAGUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Spurningurin um gagnnýtslu av fiski og fiskaúrdráttum er ein hin mest átrokandi í føroysku fiskivinnuni í dag. Traditionella flakavinnan hevur stórar trupulleikar við at klára seg í kappingini úr Kina og Baltisku londunum, og er tað tí neyðugt at leita eftir alternativum. Lyklaorðini seinastu tíðina hava snúð seg um gagnnýtslu av øllum pørtum av fiskinum og virking av hjávørum. Biotøkni er í hesum sambandi nevndur sum ein møguleiki, og verður hetta evnið eisini viðgjørt á evnisdegnum. Harumframt verður eisini alsamt størri dentur lagdur á at halda fiskin so feskan sum gjørligt, m.a. við niðurkøling umborð - og verður eisini greitt frá royndum við niðurkøling og skiljing av fiski umborð.

Soleiðis sigur Suðuroyar Skeiðsdepil í tíðindaskrivi og í dag verður evnisdagur í Stóra Pakkhúsi í Vági, har hetta verður tikið upp. Heiti er; Gagnnýtsla av fiski og fiskaúrdráttum.

Byrjað verður kl. 14.00 og skráin er henda:

Kl. 14.00
Bjóðað verður vælkomin
Kl. 14.05
Virðisøking av hjávøru - møguleikar og avbjóðingar v/ Egil Olsen (stjóri á Faroe Marin Biotech)
Kl. 14.50
Fiskivinnutengda biotøkni v/ Hóraldur Joensen (granskingarleiðari)
Kl. 15.20
Kaffi steðgur
Kl. 15.40
Royndir við niðurkøling og skiljing av fiski umborð v/ Kára Hansen (reiðari á Grunningi)
Kl. 16.10
Fígging av nýggjum verkætlanum innan fiskivinnuna v/ Símun Hammer (leiðari av Virkisráðgeving Spf)
Kl. 16.40
Kjak

Evnisdagurin endar kl. 17.00

Luttøkan er ókeypis

## VIÐMERKINGAR

# Stórt UG = 13

**Heri Mohr**



Í fjør gekk musicalin PHANTOM OF THE OPERA fyri fullum húsi í Det Ny Teater í Keypmannahavn triðja árið á rað. Eina slíka undirtøku kann onki annað leikhús í

Danmark breggja sær av. Hetta er ein av fleiri sangleikum, sum Andrew Lloyd Webber hevur gjørt tónleikin til.

Og nú hevur Norðurlandahúsið í Havn gloppað dyrnar og loyvt skúladansara- og tónaungdómum - umleið 80 í tali - at framføra sangleikin JÓSEF OG ÓTRÚLIGA LITFAGRA DREYMAKOTIÐ eftir Webber & Rice, umsettur til føroyskt av Dánjali Hoydal og Onnu Kristin Bæk. Leikstjórnað hevur Jákup Veyhe.

Hevði satt at siga uppgivið at síggja sangleikin, tí ógjørligt var at fáa billett, sølan gekk heit sum heitt breyð, men til alla Guds lukku hevði teldan onkursvegna drillað, tí fyrrapartin týsdagin 16. í h. lógu 200 billettir óseldar í onkrari skuffu, er mær fortalt, hóast útselt varð fráboðað í góðari tíð.

Glaður og spentur setti eg meg á góðan sess, og tjaldið fór til viks!

Fólk flest eru yvirhøvur ótolin, og millum manna verður hildið, at frægast man vera at dylja hendan eginleikan, men tað átti ikki at verið so, tí, er tað nakað, sum fer avstað

við fúkandi ferð, so er tað tíðin. Soleiðis tyktist løtan umleið 1 1/2 tími hendan seinnapartin í Norðurlandahúsinum at vera farin alt ov skjótt, og eg ivist ikki í, at tey umleið 7000, sum hava sæð og hoyrt sangleikin JÓSEF, hava rópt innantanna: -

Meira, meira, syngið meira.

Hendan løtan var satt at siga ein av teimum, ið ikki verða gloymdar. Vit kunnu loyva okkum at siga, sum normaðurin á sinni í villari gleði áhaldandi segði: - Det var toppen! Jamen, det var toppen! Ella sum ein klaksvíksingur segði: - Hatta var veldugt!

Sangurin "Dagar í Kána" var ein sonn perla, a catching song, men einki eigur at verða tikið fram um annað í leikinum, tí alt var professionelt gott, og tað gav yl í sálina.

Stórt ug, 13 til øll 80.

P.S.
Tað er spell, at tað ikki stendur í skránni, hvussu sangleikurin Jósef eitur á enskum.

**HM**

